Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Annika Olsen

Svarari: Djóni Nolsøe Joensen, landsstýrismaður í barna- og útbúgvingarmálum

Evni: Samsýning til fosturforeldur

Spurningar:

1. Er Fosturforeldrafelagið við í arbeiðinum í sambandi við eftirmeting av fosturforeldraskipanini?
2. Um nei, hvør er orsøkin til tað?
3. Er spurningurin um samsýning til fosturforeldur ein partur av hesum arbeiðinum?
4. Er ætlanin at hækka samsýningina til fosturforeldur?

Viðmerkingar:
Nú eitt arbeiði um at endurskoða fosturforeldraskipanina skal gerast, er tað umráðandi at hava røttu samansetingina av fólkum, sum hava kunnleika um og innlit í viðurskiftini hjá fosturforeldrum, við í arbeiðinum. Fosturforeldrafelagið varð stovnað í 2000 og hevur just havt 25 ára stovningardag. Fosturforeldrafelagið hevur havt ein stóran leiklut í arbeiðinum at styrkja fosturforeldaskipanina og at hjálpa og stuðla fosturforeldrum í uppgávuni at stuðla og stimbra korini hjá føroyskum børnum. Endamálið við fosturforeldrafelagnum er at betra um umstøðurnar hjá teimum, ið taka børn til fosturs ella umlættingar, at betra um umstøðurnar hjá børnum, sum eru til fosturs ella umlætting. Endmálið er eisini saman við myndugleikunum at arbeiða fyri at útbúgva, upplýsa, menna, ráðgeva og stuðla teimum, sum taka børn til fosturs ella umlættingar og at gera avtalu við myndugleikarnar um setanar- og lønarkor hjá fosturforeldrum. At taka sær av einum fosturbarni ella fosturbørnum er kostnaðarmikið. Samsýningin hevur staðið í stað í 7 ár (frá 2014-2021). Meðan onnur fingu 2-3 % í lønarhækkan hesi árini, fingu fosturforeldur ikki somu sømdir, og eru tí afturútsigld fíggjarliga. Neyðugt er tí eisini at taka fíggjarliga partin við í endurskoðanini av fosturforeldraskipanini, og tí verða hesir spurningar settir landsstýrismanninum.

Á Løgtingi, 11. desember 2025

Annika Olsen